

## Horns Rev 2 í vinnu

Horns Rev 2, sum verður heimsins størsta vindmyllulund á sjónum, tá hon er liðug útbygd, lat í morgun sín fyrsta streym inn á danske elkervið. Higartil eru 30 vindmyllur settar upp á Horns Rev, sum er stutt uttan fyri Esbjerg, men tá allar vindmyllurnar eru komnar, verður talið 91. Fleiri danskar fyritøkur hava gjørt sáttmála við orkuveitaran DONG Energy um at brúka orku frá vindmyllunum á Horns Rev 2, og tvær av teimum heilt stóru fyritøkunum, Novozymes og Novo Nordisk, hava tryggjað sær helmingin av allari framleiðsluni. Tær 91 vindmyllurnar á Horns Rev2 fara at framleiða 209 MW, og við tí kunnu meiri enn 200.000 donsk húsarhald fáa CO2-frían streym, sum verður leiddur inn á land og til elkervið ígjøgnum ein 100 kilometrar langan kaðal.

# Ein nýggj dimensjón í fótbólti



*Túnabóltur er føroyska heitið á Street Football. Fótbóltssambandið vil menna hetta slagið av fótbólti, ið fótbóltsforsetin kallar eina nýggja dimensjón í føroyskum fótbólti. Fyrsta vøllin fáa teir framleiddan í Føroyum*

*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

**Fótbólturin er vorðin alsamt meira stýrdur og skipaður. Tí verður nú farið undir eitt nýtt átak í føroyskum høpi, nevniliga Túnabólt. – Tað snýr seg um at fáa gleðina í fótbóltinum fram aftur, sigur Høgni í Stórustovu, føroyskur fótbóltsforseti**

FÓTBÓLTUR & RØRSLUÁR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Hetta er bara byrjanin. So avgjørdur er Høgni í Stórustovu, fótbóltsforseti í Føroyum um eitt nýtt átak, ið Fótbóltssambandið nú fer undir í samband við rørsluárið.

Túnabóltur er heitið á átakinum, ið er nýtt í føroyskum høpi. Í útlondunum er »Street football«

eittaldargamaltfyribrigdi, kanska best kent úr stóru suðuramerikansku fótbóltstjóðunum Argentina og Brasilia, tó tað er sera útbreitt kring allan heimin. Nú er so ætlanin at tað skal førast inn í Føroyum.

### Gleðin at spæla

Eitt av høvuðsendamálunum hjá Fótbóltssambandinum er at fáa fólk at spæla fótbólt, eisini øðrvísi fótbólt, enn vit kenna til í Føroyum. Endamálið við júst hesum slagi av fótbólti er sambært Høgna í Stórustovu at sleppa burtur frá tí álvarsliga.

- Tað snýr seg um at fáa gleðina í fótbóltinum fram aftur, slær fótbóltsforsetin fast.

Ein partur av ábyrgdini hjá Fótbóltssambandinum frá altjóða fótbóltssamgongunum, er at skipa og verða við í grasrótafylkingum í fótbólti, og passandi er at byrja við Túnabólti, har leikað verður tríggir móti trimum í senn.

- Hetta kann geva eina aðra dimensjón, har tað verður um at fáa gleðina inn aftur í fótbóltin, greiðir Høgni í Stórustovu frá.

### Føroyskt framleiddur vøllur

Fyrsta høvið, har hetta nýggja slagið av fótbólti verður at síggja, verður longu 5. juni, tá Tórshavnar Kommuna hevur Mentanarnátt.

Tórshavnar Kommuna fyllir 100 ár og um landið er lýst við Rørsluári í ár. Tí skipar Fótbóltssambandið fyri Túnabólti í Gamla Kommunuskúlagarðinum á Vaglinum í Havn Mentanarnáttina.

Fótbóltssambandið hevur til hetta høvi gjørt ein vøll, ið er 10 x 15 metrar stórur, samsvarandi við líkar vallir, ið verða nýttir aðrastaðni í heiminum.

Hesin vøllurin er av bandum úr aluminium, og hann verður framleiddur í Føroyum. Vøllurin er konstrueraður soleiðis, at hann lættliga kann flytast og er skjótur at seta upp. Ætlanin er so at hesin vøllurin, eftir Mentanarnáttina 5. Juni og Tórsfagnaðin 20. Juni, tá hann eisini verður nýttur, er fríur at nýta til stevnur og onnur tiltøk, har fólk ynskja hann settan upp.

Undirlagið til ein slíkan vøll er tað undirlag, ið vøllurin verður settur upp á, og tá leikt verður á Vaglinum, verður tað so á asfalti.

# Kempur hittast á søguligari grund

**Fótbóltssøga verður skrivað Mentanarnáttina hjá Tórshavnar Kommunu tann 5. Juni. Tá hittast fleiri av gomlu og nýggju kempunum í føroyskum fótbólti til Túnabólt á søguliga leikvøllinum í Gamla kommunuskúlagarðinum**

FÓTBÓLTUR OG RØRSLUÁR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Mentanarnáttin verður dagur í viku hjá fótbóltsglaðum føroyingum.

Frá morgunstundini verður skipað fyri gøtufótbólti, eisini nevnt Túnabólti, tá næmingar úr sættu og sjeyndu flokkunum í Tórshavnar Kommunu mynstra til dyst á Vaglinum.

Hetta verður fyrrapartin, og er í samband við at Tórshavnar Kommuna fyllir 100 ár, at rørsluár er skipað kring landið og at Tórshavnar Kommuna heldur Mentanarnátt sama dag.

Um kvøldið verður tó stórur dagur í føroyskari fótbóltssøgu. Tá Mentanarnáttin er sett klokkan 18, verður aftur byrjað við gøtufótbólti, og tá verður ein røð av spennandi dystum við leikarum frá fleiri av søguligu liðunum í føroyskari fótbóltssøgu.




*F.v.: Eirikur Rasmussen, ein av drívandi kreftunum úr 66-liðinum hjá HB, Høgni í Stórustovu, fótbóltsforseti í Føroyum, Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, og Karl Gudmund Henriksen, verjukempa úr 66-liðinum KÍ. Hesir hava allir sín leiklut í søguliga fótbóltsdegnum, ið verður Mentanarnáttina 5.juni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Leikararnir verða úr hesum søguligu liðunum:

- 66 liðunum hjá KÍ og HB
- HB og TB liðunum í 70-unum
- ÍF liðinum frá 79
- GÍ liðunum fyrst í 80-unum og 90-unum
- B68 liðinum frá 1992
- KÍ liðinum frá 1991 og 99
- B71 liðinum frá 1989
- HB liðinum frá 90-unum og 2002-2004
- VB liðinum frá 2000
- B36 liðinum frá 1997 og 2001
- Kvinnuliðunum hjá HB og B36 frá 90-unum
- Kvinnuliðunum hjá AB og KÍ í dag

Tað verða eldri dómarar, ið leiða dystirnar í Gamla Kommunuskúlagarði á Vaglinum mentanarnáttina 2009. Endamálið við hesum fótbóltskvøldinum er at minnast gamlar dagar, og at síggja, at sjálvt um man er farin um bestu fótbóltsár, so ber enn til at spæla fótbólt.